LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 29. mai 2024
J. nr.: 24/13397-4

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-122/2023 eftir § 52 a í Tingskipanini frá Eiriki í Jákupsstovu, løgtingsmanni, um Fast track-skipanina seinastu tíðina

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu nógvar umsóknir eftir Fast track-skipanini vóru í mars og apríl 2023?
2. Hvussu nógvar umsóknir eftir Fast track-skipanini vóru í mars og apríl 2024?
3. Hevur nakar óvanligur toppur verið á Fast track-umsóknum seinasta árið?

Svar:
Útlendingamál er felags málsøki. Hetta merkir, at tað er Styrelsen for International Rekruttering og Integration (SIRI), sum móttekur og viðger umsóknir eftir Fast track-skipanini. Eg havi tí biðið SIRI um at upplýsa okkum um aktuellu tølini.

Til spurning nr. 1
Sambært tølunum frá SIRI søktu ávikavist 29 og 39 persónar fyrstu ferð um arbeiðs- og upphaldsloyvi í Føroyum eftir Fast track-skipanini í mars og apríl 2023.

LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

Til spurning nr. 2

Sambært tølunum frá SIRI søktu ávikavist 53 og 26 persónar fyrstu ferð um arbeiðs- og upphaldsloyvi í Føroyum eftir Fast track-skipanini í mars og apríl 2024.

Til spurning nr. 3

Í niðanfyristandandi yvirliti frá SIRI síggjast tølini fyri teir persónar, sum fyrstu ferð hava søkt um arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum eftir Fast track-skipani í 2023 og higartil í 2024. Sum sæst í yvirlitinum vóru væl fleiri umsóknir í februar 2023, har 79 persónar søktu fyrstu ferð um arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum eftir Fast track-skipanini. SIRI veit ikki at siga, hví so var.

Tabel 1. Antal førstegangsansøgninger efter fast track-ordningen på Færøerne, 2023-2024*

	2023	2024*
Januar	32	38
Februar	79	49
Marts	29	53
April	39	26
Maj	37	-
Juni	24	-
Juli	27	-
August	16	-
September	21	-
Oktober	35	-
November	26	-
December	39	-
Total	**404**	**166**

*Tallene for 2024 er foreløbige og opgjort til og med april (pr. 26. maj 2024)
Anm.: Generelt bemærkes, at de statistiske oplysninger er behæftet med usikkerhed, da udlændingesystemerne er opbygget som journaliserings- og sagsstyringssystemer og ikke som egentlige statistiksystemer. Endvidere bemærkes, at der er tale om antal ansøgninger og ikke personer. Det betyder, at den samme person kan indgå flere gange over tid i forbindelse med en ny ansøgning.
Kilde: Styrelsen for International Rekruttering og Integration

Bjarni Kárason Petersen
landsstýrismaður í lógarmálum